Grundarsteinur

MENTAN

## Innihaldsyvirlit


Aðalmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 183
Samandráttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 183
Mál og strategi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 184
Útgreinað mál og strategi . . . . . . . . . . . . . . . . . . 186
Partmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 186
  Mentanararvur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 186
  List . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 189
  Ítrótt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 192

# Aðalmál

Føroyar eru fyrimynd í alheims samfelagnum. Her blóma mentan og list. Vælvirkandi skipanir borga fyri dygd og nýskapan, og mentan og list eru týðandi partar av samfelagsbúskapinum

## Samandráttur

Í 2015 hava vit í nógv størri mun enn í dag allan heimin sum fatanarkarm. Fólk verða minni staðbundin og velja at liva, har ið vælferð og góðar fortreytir fyri trivnaði eru. Landamørk hava ikki avgerandi týdning. Fólk flyta hagar, sum avbjóðingar, spennandi størv og upplivingar eru. Í 2015 verður mentan ein týðandi treyt fyri trivnaði, list ein sera nógv eftirspurd vøra og skapanarevni ein hin mest eftirspurdi førleikin.

### Virðisgrundarlag

Mentan og list hava altíð havt stóran týdning fyri samleika. Frá fornari tíð sæst, at tað hevur havt týdning, at eitt nú amboð, bygningar og rituellir lutir ikki bert hava verið arbeiðslig, men eisini vøkur.

Eisini nútíðarmenniskjað hevur tørv á at hava mentan og list uttan um seg. Býarskipan, list á almennum støðum, mál, fjølmiðlar, bókmentir, tónlist, mentanar-, ítrótta- og útbúgvingartilboð – alt hetta er avgerandi fyri samleika okkara, og hvussu vit trívast og mennast sum menniskju.

Í altjóðagjørda samfelagnum hvørva mørkini ímillum frítíð og arbeiði og ímillum tað at vera brúkari og luttakari í mentanarligum upplivingum. Eisini hvørva mørkini millum almenna og privata rúmið. Við samskiftistøknini eru vit øll »á« allastaðni og altíð. Í hesum meldrinum kann mentan vísa á upphavið og veita tryggleika at søkja longur út.




Mynd 13: Strategiskjalið er skipað soleiðis

Skulu Føroyar bjóða seg fram í alheims vitanar- og upplivingarsamfelagnum, eiga vit at menna skapanar førleikar og hugsanarhættir, tolsemi og skapa karmar fyri fjøltáttaðum, mentanarligum og listaligum virksemi. Mentan og list verða fortreytir fyri einum ríkum samfelag, og tað skapandi menniskjað verður drívmegin.

### Búskaparligt grundarlag

Listaligar vørur kunnu vera materiellar, t.e. fløgur, bøkur, málningar o.a., ella immateriellar, t.e. upplivingar, framførslur, tænastur o.a. Altjóðagerð og samskiftistøkni geva nýggjar møguleikar fyri at marknaðarføra og selja listaligar vørur. Marknaðurin fyri føroyska mentanarframleiðslu verður við hesum óavmarkaður.

Við øktari vælferð og størri keypsorku broytist nýtslumynstrið, og brúkarin keypir ikki bara sjálva vøruna, men eisini virðini, sum knýta seg at henni.

Vinnur verða mentar og flyta mørk gjøgnum gransking, og tá ið talan er um list, er tað ofta tann ikki vinnuliga úrvalslistin, ið flytur mørkini. Uttan íløgur í úrvalslist mennist breiða listin ikki. Ein íløga í úrvalslistina er sostatt eisini ein íløga í breiðu listina.

Skapandi vinnurnar[1] eiga størri og størri part av BTÚ, og aðrar siðbundnar vinnur branda vørur sínar við mentan, list og listafólkum. Skapanarevni verða ein týðandi partur av kappingarførinum, og vinnufyritøkur gagnnýta alsamt meiri skapandi førleikarnar hjá listafólki.[2]

Mentanarlig framleiðsla fær størri og størri týdning sum útflutningsvinna og er í dag størsta útflutningsvinna í USA. Við røttum hugburði, váðafýsni og átøkum kann henda vinna gerast ein týðandi partur av føroyska búskapinum.

## Mál og strategi

### Bygnaður og karmar

Bygnaðurin fevnir um Løgtingið, Mentamálaráðið, Mentanargrunn landsins, eitt nýskipað Mentanarráð Føroya, kommunur og ymsar felagsskapir, umframt norðurlendskar og altjóða samstarvsfelagsskapir.

Myndin á næstu síðu vísir bygnaðin við føroyskum og útlendskum pørtum. Úthurð og Mentanarráð eru uppskot til nýggjar stovnar.

### Mentamálaráðið

Mentamálaráðið hevur ábyrgdina av yvirskipaða mentanarpolitikkinum og skal tryggja neyðugu politisku, løgfrøðiligu og fíggjarligu karmarnar fyri at seta Visjón 2015 í verk. Mentamálaráðið ger mentanarpolitiskar raðfestingar, røkir altjóða mentanarsamstarv og ger menningar- og virkisætlanir fyri tey trý høvuðsøkini mentanararv, list og ítrótt.

### Mentanarráð

Stovnað verður Mentanarráð Føroya at ráðgeva Løgtinginum og Landsstýrinum í yvirskipaða mentanarpolitikkinum. Mentanarráðið skal virka fyri góðum samstarvi og samskifti millum stovnar og einstaklingar, ið starvast við list og varðveiting av mentanararvinum. Mentanarráðið stimbrar bygging av netverkum og tryggjar neyðugu karmarnar í hesum sambandi. Mentanarráðnum verður tryggjað neyðug fyrisitingarlig orka, og ráðið verður

[1] Telduspøl og forrit, byggilist, design og móti, filmur og sjónbandaframleiðsla, handverk og list, tónleikavinna, kringvarp, palllist, útgávuvirksemi o.a.
[2] Hugsað verður um tað, sum verður nevnt »kreativa alliansan« millum mentan og vinnulív, har vinnan hevur ásannað, at í nútímans fyritøkum er tørvur á tí kreativiteti, ið listafólk umboða.




Mynd 14: Bygnaðurin

mannað við umboðum fyri mentanarlív, landsmyndugleikar, kommunalar myndugleikar og vinnulív.

Norðurlendska mentanarasamstarvið byggir í stóran mun á meginreglur um armslongd. Mentanarráðið fær ein týðandi leiklut í norðurlendska mentanarsamstarvinum, serstakliga í sambandi við virksemið hjá Kulturkontakt Nord og Nordisk Kulturforum.[3]

### Mentanargrunnur Landsins

Nýggj lóggáva fyri Mentanargrunn landsins verður framd. Í hesum sambandi verður endamál grunsins endurskoðað, virkisøkið neyvari greinað og bygnaðurin broyttur og nútímansgjørdur við styrktum fyrisitingarførleika. Gjørd verður langtíðar fíggjarætlan fyri grunnin, so at arbeiðast kann eftir tíðaravmarkaðum virkisætlanum. Virkisøki grunsins skal m.a. fevna um hesi meginøki starvslønir og stuðul til yrkislist og til yrkislistafólk, listaliga og mentanarliga framleiðslu og útgávu, mentanarlig tiltøk fyri børn og ung, stuðul til films- og margmiðlalist og mentanarligt virksemi sum heild.

Stýri grunsins tekur í samráði við landsstýrismannin í mentamálum avgerð um innihaldið í hesum virkisætlanum grunsins. Tá ið ætlanin er samtykt, ræður stýrið einsamalt fyri árligu játtanunum. Endamálið við hesi



[3] Kulturkontakt Nord er nýskipað skrivstova undir Norðurlendska ráðharrastovninum. Skrivstovan umsitur nýggju mentanarligu rammuskráirnar. Kulturkontakt Nord er skipað eftir meginregluni um armslongd. Nordisk Kulturforum er eitt árligt fundarforum, fyriskipað av Kulturkontakt Nord, við tí endamáli at stimbra norðurlendsk mentanarnetverk og ráðgeva Norðurlendska ráðharrastovninum.

skipan er at tryggja mentanarpolitiskar raðfestingar og fullgóða nýtslu av fíggjarliga tilfeingi grunsins.

Ein fortreyt fyri at røkka málinum er, at játtan grunsins á løgtingsfíggjarlógini verður munandi økt fram til 2015.

### Kommunurnar

Eins og í grannalondum okkara eiga kommunurnar at átaka sær ein vaksandi mentanarpolitiskan leiklut. Skipað verður fyri greiðum býti millum land og kommunur á øllum mentanarøkinum.

### Áhugavirksemi

Alt byrjar við áhuga og einum kveiktum neista. Hesin týdningarmikli parturin av mentanarligu tilvitanini fer ofta fram í teim mongu áhugafeløgunum fyri list, ítrótt, trúarlív, søvn, skótarørslu og vælgerðararbeiði, har eldsálir dríva verkið, og har meginparturin av arbeiðinum er sjálvboðið.

Áhugavirksemið hevur eisini stóran týdning fyri yrkisliga partin av mentanarøkinum, tí tað betrar um kunnleikastøðið, fremur gávurøkt og er við til at ala upp evnarík fólk, ið seinni kanska gera hetta virksemið til yrkisleið sína.

Áhuga- og yrkisvirksemi hava hvør sín leiklut á mentanarøkinum, uttan tó at útihýsa hvør øðrum. Eitt samstarv millum hesi øki er ein fyrimunur fyri bæði og ein fortreyt fyri einum blómandi mentanarlívi.

Almenni mentanarpolitikkurin skal tí skapa hóskandi karmar fyri áhugavirksemið og tryggja, at tað, ið rørir seg og sprettur úr sjálvbodna áhugavirkseminum, fær neyðug gróðrarlíkindi.

### Norðurlendskt og altjóða samstarv

Mentanarligt samstarv er raðfest frammarlaga í politiska samstarvinum millum Norðurlond. Hetta samstarv ber í sær nýggjar fíggingar- og samstarvsmøguleikar og høvi at mynda nýggj netverk í øllum listagreinum og ímillum einstaklingar og mentanarstovnar.

Við avtalum verður tryggjað, at Føroyar kunnu fara upp í mentarasamstarvið hjá ES. Eisini verða sínámillum mentanarsamstarvsavtalur gjørdar við grannalondini og onnur lond.

## Partmál

Orðað eru partmál fyri:

- Mentanararvin
- List
- Ítrótt

## Mentanararvur

Mentanararvur hevur týdning fyri afturkenning og tilknýti. Mentanararvurin er tryggjaður okkum í máli, tjóðminnum, bókmentum, skaldskapi á mannamunni, í staðanøvnum, søgnum, ævintýrum, fornum handverki og fólkamentan sum heild.

Økta samskiftið og flytingin um landamørk geva nýggj innskot og mentanarligt margfeldi og føra til, at staðbundin sereyðkenni spakuliga hvørva. Avbjóðingin er at

styrkja tjóðskaparligu tilvitanina um týdningin, sum mentanararvur hevur fyri lívsvirði og trivnað, bæði úr staðbundnum og alheimsligum sjónarhorni.

## Mál

Mentanararvur og -umhvørvi eru væl miðlað, varðveitt og vard

Vitan um og atgongd til mentanararv er tøk hjá øllum

Virðing verður sýnd mentanararvi og mentanarumhvørvi hjá øðrum

**Soleiðis røkka vit málinum**

**Mentanararvur og -umhvørvi eru væl miðlað, varðveitt og vard**

Umsitingin av mentanarumhvørvi í landinum skal styrkjast og samskipast, bæði hjá landsstovnum og kommunalum stovnum, soleiðis at felags tilvitska verður um ábyrgdarbýtið lokalt og í landinum sum heild. Landsumsitingin skipar karmar og setur í verk verndartiltøk, sum hava landsfevnandi týdning. Kommunurnar skipa fyri verndartiltøkum gjøgnum byggi- og býarskipanarsamtyktir.

Á byggilistaliga økinum verða stig tikin til at orða stevnumið við atliti at eitt nú góðsku og umhvørvi, og gjørd verður ein landsbyggireglugerð, sum samansjóðar almennar reglur um bygging. Lógarverkið verður savnað í eina reglugerð og fyrisitingareind, soleiðis at øll viðurskifti eru samskipað, og staðfest verður, hvør hevur myndugleikan. Ein heildarætlan við raðfestingum eigur at verða gjørd fyri alla almenna bygging.

Stovnarnir, ið varða av mentanararvi, hava í størri og minni mun felags áhugamál viðvíkjandi fyrisitingarførleika, granskingarførleika og førleika at miðla. Hesir førleikar eiga at verða samskipaðir og mentir. Fremst í raðfestingunum er at byggja felags starvshøli og hóskandi høli til framsýningar og goymslur.

Tjóðsavn Føroya, sum er ein samskipan av stovnum, ið varða av mentanararvinum, verður sett á stovn. Tjóðsavn Føroya skal røkja framsýningar- og miðlapartin av virksemi stovnanna.

Bókasavnsvirksemi, tjóðminnasavnsvirksemi, skjalasavnsvirksemi, listasavnsvirksemi og bygdarsavnsvirksemi verða raðfest øki í mentanarpolitikkinum. Lóggávurnar skulu dagførast, og heildar- og menningarætlanir skulu gerast fyri virksemi stovnanna. Bygdarsøvnini hava týðandi leiklut í lokalu fyrisitingini av mentanarumhvørvi. Málstevnunevndin skal orða ein yvirskipaðan málpolitikk og gera uppskot til lóg á hesum øki.

Rætturin til mál verður raðfestur fremst. Øll skulu hava rætt til at læra móðurmálið, tjóðarmálið og fremmandamál. Betri undirvísingartilfar á móðurmálinum skal útvegast undirvísingarverkinum. Betri møguleikar skulu vera til málsliga eftirútbúgving. Fleiri føroyskar framleiðslur skulu vera í almennu fjølmiðlunum, og føroyskur undirtekstur skal á allar útlendskar sendingar. Stig verða tikin til at menna føroyskt vísindamál.

Menningarætlan verður gjørd fyri føroyska bókaútgávu. Ætlanin skal fevna bæði um føroyskar bøkur og týðingar til føroyskt og úr føroyskum. Útgávuvirksemið og marknaðarføringin verða fíggjað við føroyskum og norðurlendskum stuðli.

Vitan um skaldskap av mannamunni, arvaður úr fyrndini gjøgnum sagnir, ævintýr, dans, kvæði og vísur, skal mennast og miðlast gjøgnum skúlaskapin. Tímar eiga at verða avsettir til hetta, og undirvísingarførleikin á hesum økjum skal verða mentur.

Nevnd verður sett at gera uppskot um fjølmiðlapolitikk. Public service skyldurnar hjá Kringvarpi Føroya verða neyvari ásettar í avtalu um avrik millum Mentamálaráðið og Kringvarp Føroya.

Fjølmiðlapolitikkurin skal m.a. seta krøv til útbúgving og eftirútbúgving av tíðindafólki.

Mentamálaráðið ger avtalur um avrik við mentanarstovnarnar. Hesar avtalur skulu tryggja felags fatan av málum og menningarætlanum fyri stovnarnar.

### Vitan um og atgongd til mentanararv er tøk hjá øllum

Tilvitanin um mentanararvin verður ment gjøgnum miðlan. Vitan um mentanararv føroyinga skal verða lætt atkomulig hjá øllum. Hetta gerst serliga gjøgnum alnetið, og virksemi stovnanna skal mennast soleiðis, at møguleikar verða skaptir fyri munagóðari miðlan.

Eitt miðlasavn skal røkja øll talgild savnindi og standa fyri eini felags KT- og miðlanartænastu.

Mentanarstovnarnir samskipa eina verkætlan, ið skal tryggja, at talgilding av m.ø. føroyskari myndlist, føroyskum bókmentum, søguligum skjølum og tjóðminnalutum verður framd.

Søvnini skulu støðugt menna og útbyggja sínar framsýningar, bæði til ung og eldri. Framsýningarvirksemið skal byggja á holla fakliga vitan, sum er grundað á gransking av mentanararvinum.

Framsýningarvirksemið verður støði undir víðari útbygging av upplivingartilboðum við atliti at ferðavinnu, bæði í bygdasøvnum og vardum mentanarumhvørvi kring landið.

### Virðing verður sýnd mentanararvi og mentanarumhvørvi hjá øðrum

Kunning um føroyskan mentanararv og mentanarumhvørvi verður samskipað gjøgnum ein felags mentanarportal á alnetinum.

Føroyar eru við í altjóða samstarvi um at varðveita og verja mentanararv og mentanarumhvørvi. Føroyingar skulu laga seg eftir teimum etisku krøvum, ið altjóða samfelagið setur til vernd av mentanararvi og -umhvørvi.

Føroysk vísindafólk og savnsfólk eiga at vera við í altjóða samstarvi á ymiskum økjum um mentanararvin. Í 2015 eru føroysk tjóðminni umboðað á listanum hjá UNESCO yvir mentanararv heimsins.



Flytføri og altjóða samstarv hava sum fortreyt, at vit sýna tolsemi og virða mentan og mentanararv hjá øðrum fólkasløgum. Hetta skal síggjast aftur í verki í gransking og í kunning um og miðlan av mentanararvi.

## List

List er fortreyt fyri trivnaði borgarans og menning samfelagsins og er ein ágóði, ið kemur øllum samfelagnum til góðar.

Strategiin fevnir um karmar og átøk fyri allar listagreinar undir einum.[4] Tað er sera umráðandi, at tað í yvirskipaða mentanarpolitikkinum sum skjótast verða gjørdar langtíðar menningarætlanir fyri hvørja einstaka listagrein. Í hesum sambandi verður álitið Mentan og Menning dagført.



[4] List er eitt felagsheiti, ið fevnir um eina røð av listagreinum: tónlist, leiklist, dans, skaldskap, myndlist, filmslist, fotolist, margmiðlalist, listahandverk, sniðgávu, byggilist o.a.

## Mál fyri list

Øllum stendur í boði at uppliva list á altjóða stigi

Tilvitan um skapandi evni og luttøka í listaligum virksemi eru partar av uppalingarskipanini og skúlaskapinum

Listafrálæra stendur øllum børnum og ungum í boði

Útbúgvingartilboð eru til føroysk og útlendsk listafólk

Yrkislistafólk virka og eru viðurkend á jøvnum føti við aðrar starvsbólkar

Føroyar eru við í og hýsa altjóða mentanarligum tiltøkum og samstarvi.

Føroysk list og listafólk eru eftirspurd í altjóða høpi

### Soleiðis røkka vit málinum

### Øllum stendur í boði at uppliva list á altjóða stigi

List á altjóða stigi setur krøv til karmar, bæði fyri at hýsa altjóða listaligum framførslum og fyri at menna eitt fjøltáttað útboð av føroyskari list.

Serstøku listagreinarnar seta ymisk krøv til hølisviðurskiftini, sum verandi karmar ikki nøkta. Tí skal tjóðleikhús byggjast til leiklist og tónlist. Hølini bjóða fram útbúnað á altjóða stigi – eisini til miðlan og upptøkur, og harafturat bústaðarmøguleikar til altjóða listafólk.

Listadepil, ið skal skapa karmarnar fyri einum mennandi og livandi umhvørvi hjá sjónlist,[5] verður settur á stovn. Listadepilin fevnir um verkstøð, framsýningarhøli og umsiting. Bústaðar- og arbeiðsmøguleikar hjá altjóða listafólki skulu knýtast at listadeplinum.

Norðurlandahúsið skal í størri mun virka fyri mentanarligum samstarvi millum Norðurlond og Føroyar. Í framtíðini fer virkisøkið hjá Norðurlandahúsinum eisini at fevna um umsiting av nýggjum, norðurlendskum skipanum, ið tryggja føroyska luttøku í teimum nýggju rammuskráunum.

### Tilvitan um skapandi evni og luttøka í listaligum virksemi eru partar av uppalingarskipanini og skúlaskapinum

Mentamálaráðið skal orða ein mentanarpolitikk fyri børn og ung. Politikkurin skal menna mentanarligu og listaligu tilvitanina og verður settur í verk í samstarvi við dagstovnaøkið, fólkaskúlan, yrkislistabólkar og mentanarstovnar.

Øllum børnum og ungum skal standa í boði listaligar upplivingar. Á dagstovnum og skúlum verður tónlist, leiklist, skaldskapur og sjónlist ein partur av virkseminum.

Kring landið verða smærri pallar skipaðir í kommunalum høpi. Hesir pallar skulu menna føroyska list í nærumhvørvinum og hýsa altjóða listatiltøkum. Harumframt skulu kommunur tryggja, at venjingarhøli til tónlist standa ungum í boði.

[5] Myndlist, byggilist, sniðgáva, filmslist, margmiðlalist, fotolist o.a.

## Listafrálæra stendur øllum børnum og ungum í boði

Frálæran í listaligum og fagurfrøðiligum lærugreinum í fólkaskúlanum verður tímasett í yvirskipaðari lesiætlan. Hetta skal tryggja øllum børnum somu grundleggjandi frálæru.

Musikkskúlaskipanin verður umskipað bygnaðarliga og innihaldsliga til ein mentanarskúla og verður lagað til broytta kommunbygnaðin, soleiðis at talan verður um seks til átta deplar. Innihaldsliga kann skipanin eftir tørvi bjóða undirvísingartilboð í tónlist og sangi, leiklist, myndlist, filmslist, sniðgávu, dansi, skaldskapi o.ø. Mentanarskúlaskipanin verður samskipað við verandi frítíðarundirvísing.

## Útbúgvingartilboð eru til føroysk og útlendsk listafólk

Við tilknýti til Lærda háskúla Føroya verður listaháskúli settur á stovn. Listaháskúlin bjóðar í fyrstu atløgu bachelorútbúgving í neyvari ásettum listagreinum og skal eftir eina tíð mennast til at geva eitt breiðari undirvísingartilboð.

Listaháskúlin er við í altjóða skiftisskipanum, og ávíst tal av plássum verður latið útlendskum lesandi. Listaliga umhvørvið á háskúlanum verður ment við m.ø. útlendskum gestalærarum, og skúlin hevur møguleika fyri at hýsa listafólki.

Listaháskúlin bjóðar summarskúla og eftirútbúgving, og so við og við skal eitt granskingarumhvørvi mennast á skúlanum.

## Yrkislistafólk virka og eru viðurkend á jøvnum føti við aðrar starvsbólkar

Almennar skipanir skulu tryggja yrkislistafólkum møguleikar at liva og virka í Føroyum. Økt verður munandi um talið á starvslønum frá Mentanargrunni landsins. Grunnurin skal í hesum sambandi átaka sær vanliga arbeiðsgevaraábyrgd mótvegis teimum, ið fáa starvsløn.

Avvarðandi myndugleikar skulu tryggja, at serstakar skatta- og sosialskipanir verða settar í verk til tess at veita yrkislistafólkum tryggar og góðar arbeiðsumstøður.

Tilboð um samansettar starvssetanir skulu vera til teirra, ið hava listaliga útbúgving frá hægri lærustovni og undirvísa í Føroyum. Tey kunnu sostatt lutvíst virka sum lærarar og lutvíst sum yrkislistafólk, eitt nú á Tjóðpalli Føroya, Mentanarskúla Føroya og í Føroya symfoniorkestri.

Føroya symfoniorkestur verður skipað sum stovnur á løgtingsfíggjarlógini. Føroyingar nema sær í alsamt størri mun tónlistaútbúgving, og fyri at gagnnýta førleika teirra á skilabesta hátt, hevur tað týdning, at hesin yrkisligi starvsbólkur verður settur á dagsskrá.

Vinnuframa- og íverksetarastuðulsskipanir mugu endurskoðast, soleiðis at skapandi vinnur verða raðfestar. Mentamálaráðið og Vinnumálaráðið skulu í felag tryggja, at yrkislistafólk, feløg og fyritøkur fáa lut í teimum skipanum, ið verða til taks. Somu partar semjast um ein politikk fyri skapandi vinnur.

Lóggávan um upphavsrætt verður yvirtikin og lagað til føroysk viðurskifti.

**Føroyar eru við í og hýsa altjóða mentanarligum tiltøkum og samstarvi. Føroysk list og listafólk eru eftirspurd í altjóða høpi**

Úthurð, sum er ein skrivstova fyri mentanarøkið, verður sett á stovn.

Fyrsta uppgávan hjá Úthurð verður at samskipa ein felags mentanarportal. Endamálið við mentanarportalinum er at veita listafólkum, mentanarstovnum, vinnulívi og borgarum framkomna og miðsavnaða tænastu.

Aðrar uppgávur eru at skipa fyri og vera við í sølu- og netverksfremjandi tiltøkum, branda og marknaðarføra føroyska list og at skipa fyri vinnufremjandi tiltøkum innanlands og uttanlands. Úthurð røkir fyrisitingarligu uppgávur Mentanarráðsins.

Skrivstovan røkir samstarv við vinnuvirkir og felagsskapir og arbeiðir fyri felags fatan og nýggjum inntøkukeldum. Sett verða mentanarumboð á øllum føroyskum sendistovum, og avtala verður gjørd við ávísar norðurlendskar sendistovur um samstarv. Mentanarumboðini skulu í samstarvi við Úthurð promovera føroyska mentan og list, knýta sambond og byggja netverk. Úthurð skal eisini virka fyri, at føroysk mentan og list verða umboðað á almennum ferðum.



## Ítrótt

Ítrótt er fortreyt fyri trivnaði og menning borgarans og hevur týdning fyri fólkaheilsuna. Ásannandi óheftu støðuna hjá sjálvbodnu ítróttarørsluni, verða lunnar lagdir undir eina framhaldandi menning av ítróttini í nær- og fjarumhvørvinum.

## Mál fyri ítrótt

Fjøltáttað og mennandi ítróttatilboð eru til øll

Útbúgvingartilboð eru til føroysk og útlendsk ítróttafólk og -leiðarar

Føroyar eru sjónligar í altjóða ítróttasamstarvinum, taka ábyrgd og hýsa altjóða tiltøkum

Føroysk ítrótt og ítróttafólk eru eftirspurd í altjóða ítrótti
Ítrótt hevur týdning fyri landsins búskap

### Soleiðis røkka vit málinum

**Fjøltáttað og mennandi ítróttatilboð eru til øll**

Kommunurnar samstarva um at byggja ítrótta- og rørsludeplar kring landið. Fleiri ítróttagreinir verða á einum og sama staði fyri at fáa sum mest burtur úr felags umstøðum.

Ítrótta- og mentanarvirksemi verða tættari knýtt hvør at øðrum, so at felags anlegg verða nýtt á bestan hátt.

Land og kommunur orða ítøkiligan ítróttapolitikk, sum í samráði við ítróttafeløgini í økinum setur út í kortið, hvørji mál og hvørjar ætlanir eru við ítróttini í økinum í framtíðini.

Allir aldursbólkar, sama hvør førleikin er, skulu kunna vera við í onkrum rørsluvirksemi.

Í samstarvi við ítróttafeløgini eiga kommununurnar eftir tørvi at taka ábyrgd av at byggja og reka ítróttaanlegg, so at ítróttafeløgini kunnu nýta orku sína til at taka sær av dagliga ítróttavirkseminum. Samstundis seta almennu myndugleikarnir krøv um, at ítróttafeløgini menna eitt trygt og gott umhvørvi til børn og ung.

### Útbúgvingartilboð eru til føroysk og útlendsk ítróttafólk og -leiðarar

Saman við ítróttarørsluni verða tikin stig til at bøta um kunnleikan til ítrótt og rørslu, bæði hjá einstaklingunum og hjá felagsskapum. Ein liður í hesum er ein ítróttaháskúli við hesum endamálum at virka sum:

- Altjóða ítróttaháskúli fyri ung, ið júst eru liðug í framhaldsdeildini
- Ítróttaligur menningardepil fyri ung, ið vilja leingja miðnámsskúlaútbúgvingina við einum ári fyri at venja meiri ítrótt um dagin
- Miðdepil fyri útbúgving av leiðarum og venjarum í ítróttafeløgum
- Skeiðsdepil fyri einstaklingar, feløg og fyritøkur í rørslu, lívsvanum og fólkaheilsu, og at veita útbúgvingarverkinum og annars øllum samfelagnum ráðgeving

Skúlin verður fíggjaður við almennum peningi og brúkaragjaldi.

### Føroyar eru sjónligar í altjóða ítróttasamstarvinum, taka ábyrgd og hýsa altjóða tiltøkum

Føroyar átaka sær ein virknan leiklut í altjóða ítróttasamstarvinum. Arbeitt verður miðvíst fyri at vaksa um ávirkanina í altjóða felagsskapum. Samstundis átaka Føroyar sær leiklutin sum vertur fyri altjóða fundum og tiltøkum annars.

### Í samstarvi við altjóða ítróttasamgongur verður skipað fyri altjóða ítróttatiltøkum í Føroyum

Í samstarvi við Ítróttasambandið og sersambondini verða ætlanir lagdar um eina støðuga og skipaða menning av ítróttaanleggum. Gjørd verður ein landsætlan 2008-2015 fyri íløgur í landsítróttaanlegg, ið lúka altjóða treytir.

### Føroysk ítrótt og ítróttafólk eru eftirspurd í altjóða ítrótti

Við miðvísari førleikamenning av ítróttafólki og -leiðarum verður støðið á føroyskum ítróttakappingum ment. Ein menningarskipan verður gjørd, har ung, evnarík ítróttafólk fáa bestu umstøður at menna seg í síni ítróttagrein.

Flytføri og uppihald hjá dugnaligum ítróttafólki – føroyskum og útlendskum – verða tryggjað í lóggávu.

### Ítrótt hevur týdning fyri landsins búskap

Ítróttin gevur stórt íkast í samfelagsbúskapin.

Í sambandi við altjóða ítróttatiltøk verður øktur dentur lagdur á at marknaðarføra og bøta um umstøðurnar at vera vertur fyri teimum.

Gerast skulu serligar skipanir, ið kunnu lætta um eina »professionalisering« av einstøkum føroyskum ítróttagreinum, um ynski eru um tað.

Heilsufremjandi virksemið hjá ítróttini hevur við sær sparingar í almennum útreiðslum til heilsuverkið. Víst verður til Fólkaheilsuætlan føroyinga, ið umrøður týdningin av ítrótti fyri fólkaheilsuna.

## Raðfestingar

### Karmar og bygnaður

- Stovnseting av Mentanarráð Føroya
- Nýskipan av Mentanargrunni landsins
- Luttøka í altjóða rammuskráum fyri mentanararv, list, ítrótt og flytføri

### Mentanararvur

- Samskipan av søvnum
- Tjóðsavn Føroya
- Talgilding av mentanararvi
- Miðlasavn og miðlanartænasta
- Málstevna og politikkur
- Menningarætlan fyri føroyska bókaútgávu
- Avtalur um mál og avrik hjá stovnum undir Mentamálaráðnum

### List

- Skipanir at tryggja bestu virkiskor hjá yrkislistafólkum
- Førleikamenning
- Samansettar starvssetanir
- Serstøk mentanarátøk fyri børn og ung
- Mentanarskúli fyri børn og ung
- Listaháskúli
- Tjóðleikhús til leiklist og tónlist
- Økispallar
- Listadeplar
- Úthurð við mentanarportali

### Ítrótt

- Ítróttapolitikkur
- Ítrótta- og rørsludepil
- Ítróttaháskúli
- Landsítróttaanlegg
- Økt altjóða ítróttasamstarv

Hesi vóru í strategibólkinum fyri mentan:

Petur Petersen, aðalstjóri, Mentamálaráðið, formaður
Andras Mortensen, landsantikvar, Føroya Fornminnissavn
Jenny Petersen, stjóri, Tjóðpallur Føroya
Sølvi Reinert Hansen, ítróttaráðgevi, ÍSF
Dávur Winther, deildarleiðari, Klaksvíkar Kommuna
Sigvør Laksá, tónleikaumboð
Urd Johannesen, fulltrúi, Mentamálaráðið
Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri, Mentamálaráðið, skrivari
Armgarð Weihe, fulltrúi, Mentamálaráðið, skrivari